# Stuðulsfólk

**Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.**
**Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.**

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- Fylgjarauppgávur
- Stimbran
- Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Tórshavn**
**1)** - søkt verður eftir stuðulsfólki til eina 8 ára gamla fjølbrekaða gentu.
Arbeiðið er fyri tað mesta í heiminum hjá gentuni, seinnapartar og annað hvørt vikuskifti.
Arbeiðstíðin er **6 tímar um vikuna og 6 tímar annað hvørt vikuskifti.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05

**2)** - at stuðla og hjálpa einum 12 ára gomlum drongi og fara við honum til ymisk frítíðartiltøk og annars vera við til at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag
Arbeiðið hjá stuðlinum verður aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Tímatalið er **21 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05.

**Vágar**
**3)** - at hjálpa og fara við einum 9 ára gomlum drongi til ymisk frítíðar tiltøk og venjingar.
Arbeiðið hjá stuðlinum er aftaná skúlatíð hjá dronginum.
**Neyðugt er, at umsøkjarin hevur bil.**
Tímatalið er **12 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05

**4)** - at stuðla og hjálpa einum 11 ára gomlum drongi og fara við honum til venjingar og ymisk frítíðartiltøk s.s. svimjing.
Arbeiðið hjá stuðlinum er aftaná skúlatíð hjá dronginum seinnapartar og kvøld.
**Neyðugt er, at umsøkjarin hevur bil.**
Tímatalið er **18 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05

**5)** - at stuðla og menna við spæli og venjingum einum 5 ára gomlum drongi. Serliga skal dentur vera lagdur á, at menna fín - og grovmotorisku rørslurnar hjá dronginum.
Arbeiðið hjá stuðlinum verður í útibarnagarðinum í Miðvági.
**Neyðugt er, at umsøkjarin hevur bil.**
Tímatalið er **20 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05

**6)** - at stuðla og hjálpa einum 12 ára gomlum drongi, sum hevur Asberger-syndrom, og fara við honum til ymisk tiltøk og á hendan hátt vera við til at geva honum ein innihaldsríkan og skipaðan gerandisdag.
Arbeiðið hjá stuðlinum verður aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Tímatali er **20 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05

**Eysturoy**
**7)** - at stuðla, stimbra og hjálpa einum 6 ára gomlum rørslutarnaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð.
Arbeiðið verður gjørt í barnaansingini á Skála.
Tímatali er **38 tímar aðruhvørja viku**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05
**Neyðugt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort**.

**Suðuroy**
**8)** - at stuðla, stimbra og á tann hátt menna eina 3 ára gamla gentu málsliga, rørsluliga og sosialt. At stuðulin luttekur og er virkin saman við barninum og samstarvar við hini starvsfólkini á stovninum.
Arbeiðið hjá stuðlinum er í Dagstovninum Mýrifípan í Trongisvági
Tímatalið er **20 tímar um vikuna**, játtanin er fyribils galdandi til 31.12.05

Setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya pedagogfelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf.nr. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkan 09:00 og 15.00.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða Almannastovuni, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi **21. oktober 2005**

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar**.


## DRAGIHURÐAR TIL SKÁP



*Alt til heimið*

Sosialurin 341800

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60
Fax 44 84 60 · www.klementpetersen.fo
pf Klement Petersen


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4053**
**Navn:** Sp/f 28.09.2005
**Adressa:**
Niels Finsensgøta 8
Postbox 1350 110 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 28-09-2005
**Viðtøkudato:** 28-09-2005
**Stovnarar:**
P/F 2654, P/F KRK-Holding , R. C. Effersøesgøta 22, 110 Tórshavn
Sp/f 3567, Sp/f Handilskjarnin , Niels Finsensgøta 8, 110 Tórshavn
**Nevnd:**
Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir, (nevndarformaður)
Hilbert Dam, Blichervej 5, 8723 Løsning, (nevndarlimur)
Egil Á Bø, Jørundargøta 32, 188 Hoyvík, (nevndarlimur)
Kári Suni Fridrik Danielsen, Korkagøta 10, 100 Tórshavn, (nevndarlimur)
**Stjórn:**
Hans Waag, Dalatún 14, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f SPEKT, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn
**Partapeningur:**
kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
**Endamál:**
Endamál felagsins er at eiga fastognir og virðisbrøv, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.
**Roknskaparár:**
01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
28.09.2005 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya tann 05. oktober 2005*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 136,**
P/F Vónin, 530 Fuglafjørður.
**Viðtøkur broyttar:**
23.09.2005
**Partapeningur:**
Hækking við kr. 800.000,00 til kr. 7.800.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 800.000,00 til kurs 1.187,50
**Endamál:**
Endamál felagsins er at framleiða og selja trol, reka handil og ídnað ella annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 05. oktober 2005*

*Kristin Balle*

---

# Verkfrøðingur og byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi og byggifrøðingi til áhugaverd størv innan projektering og ráðgeving.

Teknistovan hevur ógvuliga fjølbroyttar arbeiðsuppgávur m.a. anleggsarbeiði, vegagerð, havnabygging, berandi konstruktiónir og húsabygging.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag ella eftir avtalu.

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Preben Hansen, tlf. 221142/312025.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu sendast til

**Preben Hansen, ráðg. verkfr.**
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
Tlf. 312025/221142
Teldupostur: phansen@post.olivant.fo

# Ársaðalfundur

Pensionistafelagið í Havn hevur ársaðalfund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 26. oktober 2005 kl. 19.00.

Dagsskrá eftir lógum felagsins.

Lógarbroyting.

**Nevndin**

# Søkt verður eftir timburlærlingi

Byrjast kann beinanvegin.

**Sp/F Karstin A. Joensen**
410 Kollafirði
Tlf. 210122 ella 421388

**Føroya Psykiatrifelag**

# Aðalfundur

Ársaðalfundur verður tann 5. november 2005.

Fundarskrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

Sosialurin
www.sosialurin.fo